# Hækkaðan vegskatt ella dýrari brennievni

**Nógvir bileigarar og bilførarar hava funnist at, at landsstýrið ætlar at hækka vegskattin við eini helvt. Fleiri halda, at tað hevði verið rættari at lagt avgjaldið á brennievni ístaðin, tí so hækkaðu útreiðslirnar hjá bileigarunum í samsvari við nýtsluna av bilinum**

VEGSKATTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í uppskotinum fyri løgtingsfíggjarlóg fyri komandi ár leggur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, upp til, at vegskatturin hækkar við umleið eini helvt. Hetta fer at geva landskassanum eina meirinntøku upp á okkurt um 25 milliónir krónur. Henda hækking rakar øll, ið eiga bil, og tað verður ikki tikið hædd fyri, um tú koyrir 10.000 ella 50.000 kilometrar árliga.

**Brennievnið kann ístaðin hækka eina krónu**

Í ár verður mett, at landskassin fær umleið 52 milliónir inn í vegskatti, meðan fíggjarlógaruppskotið fyri komandi ár sigur ein inntøku upp á 77 milliónir.

Um henda meirinntøka hjá landskassanum heldur varð fingin inn við at leggja hægri avgjald á brennievni, hevði tað merkt eina príshækkan upp á umleið 96 oyru fyri liturin.

Hetta hevði havt við sær, at útreiðslurnar hjá bileigarunum høvdu hækkað í mun til, hvussu nógv bilurin verður nýttur.

Sum tað sæst á døminum aðrastaðnis á síðuni, eru tað tey, ið hava langan veg til og frá arbeiði, sum kunnu fegnast um, at landsstýrið hevur valt at leggja størri avgjald á vegskattin heldur enn á brennievni. Tey fáa somu hækkan sum allir aðrir bilførarar.

Hjá teimum, ið ikki nýta bilin nógv, hevði tað loyst seg betur, um avgjaldið var lagt á brennievnið ístaðin.

**Eingin sparing í umsiting**

Í sambandi við kjakið um hækkaðan vegskatt í mun til hægri avgjald á brennievni, hevur tað verið ført fram, at tað kanska hevði verið eitt hugskot at strika alt tað, sum eitur vegskattur, og ístaðin fingið allan tann peningin inn umvegis brennievnið.

Um so var, hevði tað merkt ein hækking í brennievnisprísinum upp á nærum tríggjar krónur fyri liturin, og tað hevði neyvan fallið í góða jørð hjá bileigarunum.

Tað er Akstovan, ið umsitur alt tað, ið hevur við vegskatt at gera, men um vegskatturin var strikaður, hevði hetta ikki merkt nakað sum helst sparing í umsiting, sigur Hans Jacob Stenberg, deildarleiðari á Akstovuni. Hann sigur, at tað bert er eitt hálvt starv, ið burtur av tekur sær av vegskatti, so í tí stóru heildarmyndini ger tað ongan mun.




*Nógv halda tað verða skeivt at hækka vegskattin so markant, ístaðin fyri at hækka avgjaldið á brennievni. Um brennievnisavgjaldið var hækkað ístaðin, hevði tað merkt, at tey, ið koyra langt og harvið dálka meira og slíta vegirnar meira, lutfalsliga skuldu gjalda meira.*

# Bíligari hjá teimum ið ferðast langt




*Um avgjaldið á brennievni hækkaði ístaðin fyri vegskattin, hevði tað verið til gagns fyri tey, ið koyra stutt, meðan tey, ið koyra nógv, høvdu havt fingið væl størri útreiðslur.*

*savnsmynd*

Um vit samanbera eini eldri hjún í Havn við ein bileigara á Skálafjørðinum, sum hevur sítt dagliga yrki í høvuðsstaðnum, ið hava sama slag bil.

Útrokningin er gjørd við útgangsstøði í, at talan er um ein meðal bensinbil, og at bensinprísurin er tann, sum hann er í løtuni.

**Eldri hjún í Havn:**

Koyra árliga:
10.000 kilometrar
Vegskattur 2005: 2.300 krónur
Vegskattur 2006: 3.450 krónur
Øktur vegskattur: 1.150 krónur
Avgjald á brennievni ístaðin:
835 krónur meira um árið

**Bileigari á Skálafjørðinum, ið til dagligt arbeiðir í høvuðsstaðnum:**

Koyrir árliga:
40.000 kilometrar
Vegskattur 2005: 2.300 krónur
Vegskattur 2006: 3.450 krónur
Øktur vegskattur: 1.150 krónur
Avgjald á brennievni ístaðin:
2.650 krónur meira um árið

Bilførarin, ið dagligt ferðast millum Havnina og Skálafjørðin, fær eitt ferðaískoyti frá landinum upp á umleið 10.000 krónur árliga.

Bárður Nielsen, landsstýrismaður:

# - Ein samgonguavtala

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, hevur ikki tær stóru viðmerkingarnar, tá ið hann verður spurdur, um tað ikki hevði verið meiri rættvíst at útvega sær meirinntøkur umvegis brennievni heldur enn vegskattin.

Fleiri røddir hava borið fram, at bilar, sum koyra meiri enn aðrir, dálka meira og slíta vegirnir í størri mun enn aðrir, og tí eiga hesir eisini at gjalda meira. Tí halda fleiri, at tað hevði verið meiri demokratiskt at lagt hægri avgjald á brennievni heldur enn at hækka vegskattin.

- Vit hava viðgjørt málið í samgonguni, men undirtøka var ikki fyri tí. Tað er ein samgonguavtala, at øktu inntøkurnar skulu fáast inn umvegis vegskattin, og meiri fái eg ikki sagt, sigur Bárður Nielsen í stuttari viðmerking.

**tn**



*Bárður Nielsen sigur, at tað er ein samgonguavtala, at vegskatturin verður hækkaður. Hann sigur eisini, at samgongan ikki vildi, at meirinntøkurnar heldur fingust til vega við at hækka avgjaldið á brennievni.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*